Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 19.06.2025 kl. 17:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir: | Per Martin Gregersen<br>Magnus Skoralíð<br>Hanna Jensen<br>Ann Fuglø<br>Heri Mikálsson<br>Pól í Skorini<br>Tórur Didrik Djurhuus<br>Unn Jarnskor Ellingsgaard<br>Uni Rasmussen |
| Ikki møtt: | Pól í Skorini |
| Nevndarskrivari: | Erik Lervig |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerð:** | | | |
| 40/25 | 25/00185-2 | Eysturskot. Frágreiðing og tilmæli | 2 |
| 41/25 | 25/00241-2 | Tindadagur 2025, frágreiðing og tilmæli | 4 |
| 42/25 | 25/00293-2 | Báta- og listasavnið - Umsókn um rakstrarstuðul 2025. Frágreiðing og tiltæli | 6 |
| 43/25 | 25/00294-3 | Umsókn um stuðul - Víkingur 2025. Frágreiðing og tilmæli | 7 |
| 44/25 | 25/00296-1 | Avtala um byggileiðslu og ráðgeving | 8 |
| 45/25 | 25/00295-1 | Roknskapur 2024 | 8 |
| 46/25 | 25/00304-1 | Umbøn um farloyvi frá býráðnum | 9 |
| **Til viðgerð fyri afturlætnum hurðum:** | | | |
| 47/25 | 25/00297-1 | Upptøka av láni | 10 |

**Til viðgerð:**

## 40/25 Eysturskot. Frágreiðing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 07.04.2025 | 23/25 | 25/00185-2 |
| 2 Mentanarnevndin | 12.06.2025 | 34/25 | 25/00185-2 |
| 3 Fíggjarnevnd | 17.06.2025 | 36/25 | 25/00185-2 |
| 4 Býráðið | 19.06.2025 | 40/25 | 25/00185-2 |

**Málslýsing:**

Árið 2024 gekk orduliga gott hjá okkum sum felag, eisini um vit hugsa um heiðursmerkir. Skjúttar frá Eysturskot vóru í Blønduós í íslandi har eitt íslendskt felag hevði bjóða okkum av í kapping í leirdúgvuskjóting, og 5 skjúttar fóru avstað frá okkum og vunnu kappingina. Hettar felagið "Markviss" kemur til Leirvíkar seinri í ár at takað dystin upp ímóti okkum aftur, og meiningin er at hettar verður ein afturvendandi kapping.
Seinri í ár skullu 6 skjúttar til Norra at kappast í norðurlandakapping í Nordisk Trap.

Vit hava ymiskar avbjóðingar á breytuni viðvíkjandi rudding og larmi.
Eysturskot vil ikki vera til ampa fyri nakran, og tí royna vit at gera alt so gott sum vit kunna.
Vit rudda upp eftir hvørja kapping og venjing og tað tekur hugin burtur hjá fleiri av skjúttunum.
Vit hugsa í fyrstu siftu um at keypa okkum eina sláimaskinu (havatraktor) við einum uppsamlara sum er gjørdur til upptøku av leirdúgvu pettum og øðrum.

Eitt slíkt prosjekt kostar:
Havatraktorur 50.000 Kr + Uppsamlari 20.000 Kr.
Tí er okkar ynski at um vit kundu fingið 50.000 kr í stuðli til keyp av hesum, so hevði tað lætt munandi um hjá okkum, og skjúttar høvdu tíma betur at møtt upp til venjing, og økið hevði veri munandi meira innbjóðandi.

Hetta er tann, Eysturskot ynskir sær:
Løv- og græsopsamler til ATV - mi-mas.dk

Hesin kostar uml. 40.000 kr., er væl betur, og er tann, ið tey t.d. hava í Byrsumúla
https://roedkilde.com/products/affaldsopsamler-og-lerdueopsamler

2024: 25.000 kr.
2023: 30.000 kr.
2022: 200.000 kr. til útgerð/bingur
2022: 50.000 kr.
2021: 30.000 kr.

| |
|---|
| Umbiðin upphædd: 50.000 kr. |
| Dagføring 10.06.25<br><br>Mentanarnevndin var á vitjan hjá Eysturskoti 23. apríl, har Alex vísti okkum runt, nú Jónstein ikki var í landinum. Her var tað tyðiligt, at høgi prísurin uppá dúgvir og patrónir saman við avbjóðingini við rudding var eitt, ið ávirkaði felagið nógv. Alex helt eisini, at hetta er ein grund til, at tað ikki koma fleiri limir til.<br><br>Í telduposti aftan á fundin varð greitt frá, at: "Í samband við byngjurnar, er yvamál um tað er forsvarligt at byggja sum ætlanin var, tí stormurin síðsta vetur sum oyðilegði og breyt ymiskt á breytuni var so harligt at alt bleiv sett á pausu, ímeðan við kanna møguleikarnar fyri eini ørvísi loysn, kanska ikki byggja so høgt....."<br>Afturat hesum verður greitt frá, at "Í løtuni eiga vit 170.000 Kr á bók og eru vit í holt við at finna fyrstu 2 byngjunar, eina 20 fót og eina 40 fót, og so takað vit tað harífrá. vit ætlað at fáa klædning á tær sum skjótast, so ongin sær at tað eru byngjur."<br>Aftan á hesi vitjan fingu vit roknskap fyri 2023 og 2024, teir eru knýttir at málinum.<br><br>Í telduposti greiðir Jónstein frá, at tað er avgjørt at steðga við vápnaskeiðnum, ið annars hevur givið eina ávísa inntøku. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2025 eru 850.000 kr. settar av til rakstrarkonto 524, "Stuðul til ítrótt". Herav eru per d.d. 850.000 kr. tøkar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Mentanarnevndin 07. april 2025**

Málið er viðgjørt. Umsitingin kannar málið nærri í samskifti við felagi.

**Mentanarnevndin 12. juni 2025**

Mentanarnevndin mælir til at veita Eysturskoti 50.000 kr. í rakstrarstuðli sambært umsókn.

**Fíggjarnevnd 17. juni 2025**

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

**Býráðið 19. juni 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini

## 41/25 Tindadagur 2025, frágreiðing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 21.05.2025 | 33/25 | 25/00241-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 26.05.2025 | 25/25 | 25/00241-2 |
| 3 Mentanarnevndin | 12.06.2025 | 35/25 | 25/00241-2 |
| 4 Fíggjarnevnd | 17.06.2025 | 28/25 | 25/00241-2 |
| 5 Býráðið | 19.06.2025 | 41/25 | 25/00241-2 |

**Málslýsing:**

Kappróðrarfelagið Tindur ynskir aftur í ár at skipa fyri einum "Tindadegi" eins og í fjør. Hetta verður 23.08., tá seglskipini koma.
Dagurin í fjør var ein góður dagur, og Tindur ynskir tí at gera tað aftur á nøkurlunda sama hátt sum í fjør.

SEK verður brúkt, so trygdin er í ordan.

Nógv útgerð verður leigað og allar útreiðslur liggja hjá Kapróðrarfelagnum.
Alt yvurskotið, um nakað verður, fer óðskert til Tind og verður brúkt til venjingarútgerð til nýggja neystið

Í fjør vóru uml. 70.000 kr í útreiðslum, "men eisini kom nakað inn, so dagurin gav ikki undurskot. Men uttan tykkara stuðul kann tað ikki gerast."

Umbiðin upphædd: 80.000- 100.000 kr

Upphædd játtað í fjør: 40.000 kr.

---

Dagføring 10.06.25

Viðfest í málið er nú budget fyri Tindadagin 2024 og somuleiðis frágreiðing um, hvussu Tindadagurin 2025 væntandi fer at fara fram.

Tindadagurin 2025:
Vit koma at hava ca tað sama í ár sum í 2024.
Okkurt afturat í ár afturat, so sum:
Sleipa pútur aftan fyri skjóttgangandi bátum.
Sigli túrar til Kalsoynna.

| |
|---|
| Møguliga túrar við bátinum hjá Uptour (Eirikur á Húsamørk), har er møguleiki at rógva, stima og sigla við segli.<br><br>Hetta skal vera eitt tiltak, har øll kunnu vera við, vit hugsa um familiur við fleiri børnum, at tey ikki setast aftur vegna høgan prís. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2025 eru 600.000 kr. settar av til rakstrarkonto 522, "Stuðul til mentan". Herav eru per d.d. 186.000 kr. tøkar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at lata eina passaliga upphædd í stuðli |

**Mentanarnevndin 21. maj 2025**
Mentanarnevndin mælir til at Tindur fær 40.000 kr. til at skipa fyri Tindadegnum og at peningurin verður játtaður av «Stuðul til ymisk mentanartiltøk»

**Fíggjarnevnd 26. mai 2025**
Málið tikið av skrá

**Mentanarnevndin 12. juni 2025**
Mentanarnevndin mælir til at Tindur fær 40.000 kr. til at skipa fyri Tindadegnum og at peningurin verður játtaður av «Stuðul til ymisk mentanartiltøk». Harumframt heitir nevndin á umsiting og felag at samskipa tiltøk, sum verða á sjálvum degnum.

**Fíggjarnevnd 17. juni 2025**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini

**Býráðið 19. juni 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 42/25 Báta- og listasavnið - Umsókn um rakstrarstuðul 2025. Frágreiðing og tiltæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 12.06.2025 | 39/25 | 25/00293-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 17.06.2025 | 31/25 | 25/00293-2 |
| 3 Býráðið | 19.06.2025 | 42/25 | 25/00293-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Tummas Justinussen, formaður, søkir vegna Báta- og listasavnið um árligan stuðul fyri 2025.<br><br>Umbiðin upphædd: 170.000 kr. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2025 eru 170.000 kr. settar av til endamálið (52812 – Bátasavnið) |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at ganga umsóknini á møti |

**Mentanarnevndin 12. juni 2025**
Mentanarnevndin mælir til at ganga umsóknini á møti við 170.000 kr.

**Fíggjarnevnd 17. juni 2025**
Fíggjarnevdin tekur undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

**Býráðið 19. juni 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 43/25 Umsókn um stuðul - Víkingur 2025. Frágreiðing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 12.06.2025 | 40/25 | 25/00294-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 17.06.2025 | 32/25 | 25/00294-3 |
| 3 Býráðið | 19.06.2025 | 43/25 | 25/00294-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Fóltbóltsfelagið Víkingur søkir um árligan stuðul. Tað gongur væl hjá felagnum og hugburðurin er jaligur.<br>Roknskapur fyri 2024 er viðfestur málinum.<br><br>2022: 600.000 kr<br>2023: 600.000 kr<br>2024: 600.000 kr.<br><br>Umbiðin upphædd: 600.000 kr |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2025 eru 850.000 kr. settar av á rakstrarkonto 524, "Stuðul til ítrótt". Herav eru 652.000 kr. tøkar per d.d.<br>Á hesi rakstrarkonto eru 600.000 kr. tillutaðar Víkingi |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at veita stuðul |

**Mentanarnevndin 12. juni 2025**
Mentanarnevndin mælir til at lata Víkingi 600.000 kr. í rakstrarstuðli.

**Fíggjarnevnd 17. juni 2025**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini

**Býráðið 19. juni 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 44/25 Avtala um byggileiðslu og ráðgeving

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 17.06.2025 | 34/25 | 25/00296-1 |
| 2 Býráðið | 19.06.2025 | 44/25 | 25/00296-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Støðutakan til uppskot til avtalu um byggileiðslu og byggiharraráðgeving viðv. út- og umbyggingini av skúlanum í Leirvík. Sí fyriliggjandi uppskot |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at góðkenna fyriliggjandi uppskot til avtalu |

**Fíggjarnevnd 17. juni 2025**
Fíggjarnevndin mælir til at góðkenna fyriliggjandi uppskot til avtalu.

**Býráðið 19. juni 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndin.

## 45/25 Roknskapur 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 17.06.2025 | 33/25 | 25/00295-1 |
| 2 Býráðið | 19.06.2025 | 45/25 | 25/00295-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Roknskapurin hevur eitt RLÚ úrslit uppá -30.212 mió. kr.<br><br>Samlaðu inntøkurnar eru 147.496 mió. kr.<br>Rakstrarútreiðslurnar eru 120.334 mió. kr.<br>Rakstraravlopið er 27.192 mió. kr.<br><br>Rentuútreiðslurnar eru 2.485 mió. kr.<br>Útreiðlur til rentustuðul eru 2.745 mió. kr.<br><br>Samlaðu íløgurnar eru 52.144 mió. kr. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
| --- |
| |

| **Tilmæli** |
| --- |
| Mælt verður til at góðkenna fyriliggjandi roknskap fyri 2024 |

**Fíggjarnevnd 17. juni 2025**
Fíggjarnevndin mælir til at góðkenna fyriliggjandi roknskap.

**Býráðið 19. juni 2025**
Einmælt saamtykt at góðkenna roknskapin fyri 2024

## 46/25 Umbøn um farloyvi frá býráðnum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
| --- | --- | --- | --- |
| 1 Býráðið | 19.06.2025 | 46/25 | 25/00304-1 |

| **Málslýsing:** |
| --- |
| Rebekka Jensen, sum er vald í býráðið á lista O, hevur biðið um farloyvi frá býráðnum frá 1. august 2025 til 1. Januar 2027. Næstvaldi á lista O er Tórur Didrik Djurhuus. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
| --- |
| |

| **Tilmæli** |
| --- |
| |

**Býráðið 19. juni 2025**
Einmælt samtykt at ganga umsóknini á møti og at næstvaldi á lista O, Tórur Didrik Djurhuus, tekur sæti í býráðnum og føstu nevndunum fyri Rebekku Jensen

## Til viðgerð fyri afturlætnum hurðum:

## 47/25 Upptøka av láni

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 17.06.2025 | 35/25 | 25/00297-1 |
| 2 Býráðið | 19.06.2025 | 47/25 | 25/00297-1 |

**Fíggjarnevnd 17. juni 2025**
Mælt verður til at fíggjarnevndin fær heimild til at taka av lægsta tilboðnum uppá fígging

**Býráðið 19. juni 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini

fundurin lokin kl. 19.00

Per Martin Gregersen

Magnus Skoralíð

Hanna Jensen

Ann Fuglø

Heri Mikálsson

Ból í Skorini

Tórur Didrik Djurhuus

Unn Jarnskor Ellingsgaard

Uni Rasmussen